

www.oljan.fo

**Jan Müller** 05 - 03 - 2012

# Japan skerjir oljukeypið úr Iran

USA vil hava onnur lond at gevast við at keypa olju úr Iran og hóttir við tiltøkum, um lond ikki gera eftir áheitanini. Eitt av hesum londum er Japan. Í seinastuni hava samráðingar verið millum amerikanarar og japanar um málið, og japanski uttanríkisráðharrin, Koichiro Gemba, segði í dag, at partarnir eru næstan komnir á mál. -Japan fer at skerja sín oljuinnflutning úr Iran fyri at sleppa undan amerikonskum tiltøkum, og samráðingarnar eru næstan lidnar, segði ráðharrin. Hann legði afturat, at Japan fer neyvan at almannakunngera, hvussu nógv minni av olju landið fer at keypa úr Iran fyri ikki at ávirka marknaðin. Japan fór fyri fleiri árum síðani undir at avmarka sín oljuinnflutning úr Iran, og tey seinastu fimm árini er innflutningurin haðani minkaður eini 40 prosent.